




við í dystinum, og sjáldan man eitt lið hava havt so nógv brúk fyri einum hálvleikssteðgi, sum kollfirðingar høvdu tað leygardagin.

## Áki aftur á vøllin

Vestmenningar vóru á odda við sjey málum í steðginum, og teir koyrdu á við fullari ferð at kalla allan dystin. Tíðliga í seinna hálvleiki gjørdi stórskjúttin Áki Olsen so comeback á liðnum, og hann hevði bert verið á vøllinum í ein hálvan minutt, so var hann komin á máltalvuna.

At síggja til hevur tað ikki havt nakra ávirkan á Áka, at hann hevur verið burtur við skaða í ein góðan mánað, tí hóast hann einans fekk ein lítlan hálvleik á vøllinum, so gjørdist hann toppskjútti hjá vestmenningum við seks málum.

At sigurin hjá VÍF ikki gjørdist størri enn tey níggju málini, hevði eisini sínar orsøkir. Ein var tann, at so hvørt sum seinni hálvleikur leið, fóru teir gulu úr Vestmanna at hugsa meira um klokkuna enn sjálvan dystin, tí teir vildu bara sleppa at feira meistaraheitið. Hin orsøkin var tann, at ungi KÍF-málverjin, Jaspur Joensen, ið loysti ein meiddan Óla Kristian av tíðliga í seinna hálvleiki, spældi ein fínan dyst og hevði fleiri heilt góðar bjargingar.

## Fult uppiborið

At VÍF nú í triðseinasta leikumfarið tryggjaði sær føroyameistaraheitið í manshondbólti er fult uppiborið. Teir hava verið nógv tað mest støðuga liðið í kappingini, og so hava teir eisini havt tað hepnið, ið eitt topplið skal hava.

Tá ið dystir hava staðið til at fara báðar vegir, hevur tað at kalla hvørja ferð fallið út til teirra fyrimun, og tað er ikki av tilvild.

Verður hugt at fólkinum, sum venjarin Dia Midjord hevur at ráða yvir, so kann eisini staðfestast, at tað er eitt sera væl samanspælt lið, ið vestmenningar hava. Teir allarflestu hava verið á besta liðnum hjá VÍF í mong ár, og útskiftingin hevur verið lítil og eingin.

Tá ið so vestmenningar fyri góðum mánað síðani vóru hart raktir av skaðum, vóru tað mong, ið høvdu hug til at avskriva VÍF sum meistaraskapskandidatar, men teir tóku øll á bóli og bara øktu um leiðlsuna hjá sær á stigatalvuni.

Profilar sum Ingi Olsen, Áki Olsen og Áki G. Olsen vóru burtur, og tí noyddust aðrir at taka ábyrgd á liðnum, og hetta hava teir gjørt so dyggiliga. Menn sum Eli Müller, Daniel Rapa, Harald Bjørgvin og aðrir hava veruliga blóma í seinastuni, og VÍF hevur við einum framúr góðum liðavriki seinastu vikurnar tryggjað sær meistaraheitið, sum teir vóru so sera nær við at vinna seinasta kappingarár.

Hóast vestmenningar longu nú eru meistarar, so er ikki væntandi, at teir fara at taka sær av løttum í teimum báðum seinastu dystunum. Komandi vikuskifti skulu teir til Havnar at taka dystin upp við arvafíggindarnir úr Kyndli, og tað er einki at ivast í, at vestmenningar ógvuliga fegnir vilja vinna tann dystin.

Í seinasta dystinum er tað so steypavinnararnir úr StÍF, sum koma á vitjan í Vestmanna, og tað hevði verið eitt virðuligt punktum fyri eitt flott kappingarár hjá VÌF, um teir endaðu árið við at hevna ósigurin í steypafinaluni, samstundis sum teir tóku ímóti gullkrónunum.

### KÍF-VÍF 19-28(8-15)

**KÍF:** Regin Petersen 5(2), Rógvi Weihe 4, Arnbjørn Hansen 3, Teitur Joensen 3, Jaspur Joensen 1, Mirko Milinkovic 1, Gert Hansen 1, Jóan Pauli Olsen 1

**VÍF:** Áki Olsen 6, Áki G. Olsen 4, Sámal Joensen 4, John Zachariassen 3, Harald Bjørgvin 2, Agnar Joensen 2(1), Daniel Rapa 2, Sjúrður Poulsen 2, Johnny Joensen 2, Jákup Súni Andreasen 1

**Brotskøst:** KÍF 4(2), VÍF 3(1)

**Útvísingar:** KÍF 3, VÍF 4

**Dómarar:** Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen - Dømdu ein góðan dyst, hóast dysturin ikki var serliga lættur at døma. Høvdu eina greiða linju, og tóktust allatíðina sera avgjørdir í sínum dómum.



Dia Midjord, gullvenjari:

# - Menn hava verið ótrúliga raskir



**Dia Midjord rósti sínum monnum fyri at hava verið ótrúliga raskir at møta upp til venjing, og hann helt eisini, at breiddin hjá vestmenningum veruliga hevur staðið sína roynd**

GULLPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Undan kappingarárinum hevði Dia Midjord sett sær mál, at VÍF skuldi gerast millum trý tey fremstu liðini í landskappingini, og kanska eisini vinna sær sess í steypafinaluni. Nú hann kann taka saman um kappingarárið, hevur VÍF vunnið gull, og noydust at lúta í steypafinaluni fyri StÍF.

- Alt í alt eri eg stak væl nøgdur við kappingarárið, og eg hevði als ikki roknað við, at vit skuldu standa sum gullvinnarar longu í triðseinasta leikumfari, sigur Dia Midjord.

## Hava verið mest støðugir

Spurdur hvussu tað ber til, at VÍF er so nógv framman fyri hini liðini í ár, sigur Dia Midjord:

- Vit hava helst verið tað mest støðuga liðið í ár. Í byrjanini av kappingarárinum vunnu vit fleiri dystir við einum máli, men nú í seinastuni hava vit vunnið støðugt, meðan hini liðini samstundis hava verið sera ófør til at taka stig frá hvørjum øðrum. Kyndil fekk so eisini av eini ella aðrari orsøk ein óhepnan niðurtúr í endaspælinum, og tað var so bara til okkara fyrimun, sigur gullvenjarin hjá vestmenningum.

- Hetta saman við eitt sindur av hepni og harðari venjing hevur givið úrslit.

Vit hava vant hart, og serliga tíðliga í árinum vandu vit sera hart, og tað skal sigast, at menn hava verið ótrúliga raskir til venjing. Uppmøtingin hevur verið framúr góð, og innsatsurin hevur verið 100 prosent hjá øllum, greiðir Dia Midjord frá.

## Aðrir tóku ábyrgd

Tá ið VÍF misti tríggjar av sínum lyklaspælarum fyri góðum mánað síðani, væntaðu fleiri, at tað fór at kosta VÍF dýrt, men tað vísti seg bara tað øvugta. Spurdur hvussu tað ber til, sigur Dia Midjord:

- Tað er ofta so, at tá ið eitt lið antin missir leikarar ella venjara, so hevur tað antin eina negativa ella positiva ávirkan, og í okkara føri tippaði tað tann rætta vegin. Menn skiltu tað, at nú skuldi ein eyka innsatsur til, og tað eru nógvir, sum veruliga tóku ábyrgd. Hýrurin í hópinum var allatíðina sera góður, og tað hevur gingið ótrúliga gott, sigur Dia Midjord.

Tá ið vit at enda spyrja Dia, um hann fer at halda fram í Vestmanna komandi ár, sigur hann, at tað veit hann ikki enn. Tað man tó neyvan verða nakað dulsmál, at teir í VÍF undir øllum umstøðum fegnir vilja hava havnarmannin at halda fram sum venjara.